Geilargøta 6
FO-513 Syðrugøta
Tlf. +298 757969
e-postur: utoyggj@utoyggj.fo

**Til Føroya løgting** **Stóra Dímun 05.08.07**

**Áheitan og kunning um framleiðsluhús á útoyggj**

**Útoyggjafelagið heitir við hesum á Føroya løgting og Føroya landsstýri um at stuðla undir og tryggja, at verkætlanin "Framleiðsluhús á útoyggj" kann fremjast.**

Lýsing av verkætlanini
Útoyggjafelagið hevur í nøkur ár arbeitt fyri at fáa eina verkætlan á føtur, ið inniber, at framleiðsluhús verða bygd á útoyggj. Talan er um heilsufrøðiliga góðkend høli, ið hava hentleikar, ið gera, at náttúrutilfeingið í oynni kann hagreiðast og góðskast, og harvið skapa grundarlag fyri øktum vinnuvirksemi, grundað á ta rávøru, ið er á hvørjari einstakari oyggj.

Hetta seinasta árið eru ítøkilig stig tikin til tess at fáa hesa verkætlan framda. Ætlanin er tilrættaløgd soleiðis, at byrjað verður í Stóru Dímun, og síðani verður hildið fram á hinum útoyggjunum.

Komið er nú so væl ávegis, at tekningar av bygninginum eru gjørdar - í samstarvi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, byggiloyvi er fingið, og byggibúningin av lendinum er komin væl ávegis. Ætlanin í Dímun er at byggja ein bygning, sum er 8m x 21m, harav onnur helvtin verður nýtt til slátur, og hin helvtin til annað vinnuligt virksemi so sum at góðska seyðaskinn. Metti kostnaðurin av bygninginum er á leið ein millión krónur.

Vit hava hetta seinasta árið tosað við IMR um fígging, tí henda ætlanin er av alstórum týdningi fyri framtíðarmøguleikarnar í Stóru Dímun, og tað sama er galdandi fyri aðrar útoyggjar, men hetta er ov kostnaðarmikið fyri útoyggjarnar einsamallar at fremja. Okkara hugsan er, at tað er neyðugt við almennari fígging til at fáa hesar karmarnar til vega, men at raksturin eftirfylgjandi skal hvíla í sær sjálvum.

Vit vilja í hesum viðfangi eisini vísa til ráðstevnuna, sum Útoyggjafelagið skipaði fyri í Norðurlandahúsinum í summar, har allir politisku flokkarnir vóru við, og har vit greitt fingu at vita frá Bjarna Olsen, stjóra í Eik banka, at privati fíggjarmarknaðurin ikki er sinnaður at veita fígging til vinnuligt virksemi á útoyggj.

Framtíðarmøguleikarnir fyri at búleikast á útoyggjunum eru m. a. neyvt knýttir at øktum vinnuvirksemi. Sostatt er altumráðandi, at henda verkætlanin verður framd og fær neyðugan politiskan stuðul og vælvild.

ÚTOYGGJAFELAGIÐ

Geilargøta 6
FO-513 Syðrugøta
Tlf. +298 757969
e-postur: utoyggj@utoyggj.fo

Áheitan

Útoyggjafelagið vil við hesum heita á Føroya løgtingi og Føroya landsstýri, um í verki at vísa, at vilji og áhugi eru fyri at tryggja útoyggjunum eina framtíð í menning.
Ítøkiliga verður hetta gjørt við at semja fæst um at seta pening á komandi løgtingsins fíggjarlóg / eykafíggjarlóg, so at verkætlanin “Framleiðsluhús á útoyggj”, ið er byrja við Stóru Dímun kann gerast veruleiki.

Vit vilja til eina og hvørja tíð fegin møta á fundi, um neyðugt er at greina og greiða gjølligari frá verkætlanini.

Vinarliga

Óla Jákup úr Dímun, formaður